**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADEILDIN*

## Endurlýsing

### Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum

# stuðli og frítíðaravloysarum í summar

Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum stuðli til rørslutarnaðan mann. Tann, ið settur verður, fer at arbeiða saman við øðrum stuðlum, ið ganga inn í eina 24 tímars vaktarskipan. Starvið er normerað til 24 tímar um vikuna.
Møguleiki er eisini fyri eyka vaktum.
Arbeiðsstaðurin er í Tórshavnar Kommunu.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar, heilsuhjálparar hava fyrimun til hesi størv.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá serráðgeva, Fíu Jespersen, tlf. 354020.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 15. mai 2006 sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att.: Fíu Jespersen
Løkjatún 1, F0 –160 Argir
Tlf: 354020 - Telefax 354021


# Koyrikort?

Teoriskeiðið
til persónbil,
byrjar
týsdagin
**2. mai**
**kl. 17.00**

Teoriskeiðið
til
lastbil og trailara,
byrjar
mikudagin
**3. mai**
**kl. 17.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**


# Lærarastarv í Tofta skúla

Eitt fast fulltíðarstarv við Tofta skúla er leyst at søkja. Starvið verður sett frá **1. august 2006.** Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Tann, ið verður settur í starv, skal kunna átaka sær:**
- flokslærarauppgávu
- undirvísing í máli
- undirvísing í handaligum lærugreinum

**Vit seta í løtuni fokus á:**
- virðisgrundarlagið fyri Tofta skúla
- um- og útbygging, væntandi liðugt 2008
- undirvísingarpartarnir sum sjálvstýrandi toymi

**Vit vænta at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og er hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan.

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum **í hendi í seinasta lagi týsdagin 16. mai kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 og 747765 ella Olaf Magnussen, varaskúlastjóra á tlf. 447332 og 270963.

**Tofta skúli**
Postboks 41
FO-650 Toftir

*Tofta skúli hevur komandi skúlaár um 189 næmingar og um 20 lærarar.*
*Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof*



## Miðvágs-Sandavágs skúli

Vegna sjúkrafarloyvi hjá einum av lærarum okkara verður søkt eftir lærara til Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. mai til 9. juni 2006.

**Tímatalva:**
4 t. í donskum í 10. flokki
2 t. í kristni í 7. flokki
8 t. í tónleiki í 1., 2., 3., 4. og 5. flokki
2 t. í heimstaðarlæru í 2. flokki
5 t. í miðfirring í 3. og 6. flokki

Starvið verður lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastjóranum í hendi skjótast tilber.

**Miðvágs-Sandavágs skúli**
v/Hans Jørgensen, skúlastjóra
FO-370 Miðvágur
Tlf. 332318 og 218820


# Til skrivstovuna



**Brother**

**Lit laser All-In-One**
**Fax/Print/Kopi/Skan**

Upp til 9600 dpi
Svart 31 síður/min
Lit 8 síður/min
Netkort
USB og paralell portur
Íroknað tónarar og dreivara

# Kr. 8.450,-

SpF Teldu Tænastan

**Telefon: 317620 • Telefax: 317699 • Heimasíða:**


## Kunngerð

### frá útskiftingarnevndini fyri Hests bygd

Næsti útskiftingarfundur verður hósdagin 4. mai 200 kl. 9.30 í bygdarstovuni í Hesti.

1) Fyribilsplanur verður framlagdur.
2) Ætlaða kommunala ognartøkan verður framløgd.

Tórshavn, tann 21. apríl 2006

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarformaður

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo